# Skemt

Kvinnurenning á pápadegnum:

## Farið endiliga og rennið!

Stóra Kvinnurenningin verður hildin á sjálvum pápadegnum 5. juni. Og so hugsaðu nógv, at tað var løgið, at meira enn 2000 kvinnur skulu rýma av húsum sjálvan pápadagin. Men í grundini er tað ein fín loysn. Hvussu kann ein pápadagur haldast betur, enn við at mamman er úti og rennur. Deiligur friður at hyggja eftir fótbólti í sjónvarpi, drekka eina øl og hava beinini uppi á sofaborðinum. Jú, kvinnur, farið endiliga út og rennið pápadagin – tað er ein góð gáva til mannin! Kunnu tit bara líka minnast til at seta øl í køliskápið og keypa chips, áðrenn tit fara út?





## Ári leitar eftir kavbátum

Roysningurin Ári, sum vitjaði í Føroyum herfyri, er farin til havs. Ein sendari á roysninginum ger, at tað ber til at fylgja hansara ferð. Ári setti kós í ein norðan, men so suður eftir aftur, og hevur nú svomið í ein landsynning í eina tíð. Herfyri skrivaði Sosialurin, at russiskir kavbátar hava kannað havbotnin norðanfyri Føroyar. Og tað sær út til, at Ári hevur fingið frænir av onkrum norðanfyri. Sær næstan út, sum um hann jagstrar russiskar kavbátar.

## Maðurin og vaski-klæði

Ein maður, sum sendi skitin klæði hjá sær á eitt vaskarí, setti ein pappírslepa á skjúrtuflippuna, har hann skrivaði "brúka meira sápu her". Tá hann fekk klæðini aftur, var ein pappírslepi í nývaskaðu undirbuksunum. Har stóð "brúka meira pappír her".

## Í RANGASTRÚPAN

**Bjargingarbátar – nú við navni og kvinnum**
Í gjárkvøldið var Tjaldrið á Havnarvág og kannaði tveir bjargingarbátar.Tað vísti seg, at Lómur mannaður við kvinnum ongan radarreflektor hevði. Hin báturin var Gongurólvur, eisini mannaður við kvinnum.
*Tíðindi á Rás2*

**Hvør er bilførari?**
Sex and the City-treylarin er á gøtuni
*Planet.fo*

**Tað var løgið**
Steinar eru kastaðir inn gjøgnum rútarnar, sum nú eru knústir
*Dimma*

**Heitur jøkul**
Eyjafjallajøkull hevur goyst tvær ferðir
*Portal.fo*

**Ja, men tíbetur var tað bara blámusoppur**
Hevur tú fremmandar gestir við hús?
*Sosialurin*

**Sjálvandi! Skuldi tað kanska verið menn?**
2033 kvinnur til Kvinnurenningina
*Portal.fo*

**Bara tað ikki bleiv pínlig luft**
Løgmaður fær sviskur frá drotningini
*Olivant*

**Gera vit ikki øll tað?**
Badmintonfelagið satsar uppá framtíðina
*Norðlýsið*

**Einki meira enn vanligt!**
Serfrøðin talar í eyst og vest
*Jóannes Eidesgaard í viðmerking*

**Altjóða rák!**
Jóhanna Sigurðardóttir vil hyggja frameftir
*Olivant*

**Ein mánaður størri enn alt 2009**
Sands kommuna fekk góðar 174.00 krónur meira inn í skatti í mars mánað í ár samanborið við í fjør.
*Kringvarp.fo*

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



## Síðvetur

Ein av síðvetrardøgunum í síðstu viku, eg var á mínari dagligu sálarbøtandi gonguferð í hálvvillu nátúrini í Havn, varð eg við eitt skræddur úr mínum sálarbótartonkum. Har vóru tvey smálomb, nei, har var eitt afturat. Trý smálomb, svørt sum pápin. Hann helt seg eitt sindur burturfrá, arrogantur og sýntist ikki at hava stórvegis áhuga fyri hesum nýggju í fylginum. Hansara arbeiði var langt síðani gjørt.

Nú er tað her, nú er tað komið, tað, sum summi kalla vár, segði eg við meg sjálvan, tí har eingin annar. Eg steðgaði og stóð eina góða løtu og hugdi eftir hesum fyrstu síðvetursboðunum. Ein nógv størri gleðiboðskapur enn hasin veruleikafjari ynskidreymurin nakrar dagar frammanundan, á páskum. Ein veruleikans gleðiboðskapur. Og ikki eitt orð um páskalambið, takk!

Gásarsteggin á stykkinum, eg gangi framvið tvær ferðir um dagin, kom aftur í gjáramorgunin spelandi við nevinum fremst sum eitt spjót móti mær.

Hann tekur fjórðings kúfóður upp á fýra sekund sum einki, físir og fylgir mær fram við stikinum til hann ger eina skjóta strategiska meting og vendir gartandi við og roynir at flúgva aftur til bøguna. Men veingirnir eru skerdir.

Tvær ferðir um dagin sama ritualið. Altíð árvakin, steggin, eisini klokkan hálvgum seks um morgunin. Hann kemur so nær, at tú sært ljósabláu ringarnar í eygunum.

Eg giti, hann hugsar og físir: pínadoyð, kemur hasin dummi fanin aftur tvætlandi her í morgun.

Í morgun svav hann, sá eg, tá eg kom oman eftir vegnum. So eg fór eina aðra leið fyri ikki at órógva hann. Hann var einsamallur í morgun. Bøgan er farin í gásarhúsið, giti eg. Skjótt verður gult lív á stykkinum. Hvussu nógvir verða teir í ár, gásarungarnir? Í fjør vóru bara fýra.

Og á trøðni vestanfyri eru geitarlombini komin út at skatta heljardýpið. Enn eru tey ikki farin at hoppa um allar geilar, men eru hjá mammuni við húsið. Verðin er stór, so hon má takast stig fyri stig.

Dunnuungarnir koma eisini skjótt, minnist meg rætt. Teir eru sum samdøgursflugurnar. Fáa eina stokkuta løtu í ánni, áðrenn aðrir fuglar taka teir. Náttúran, eisini tann í stórbýnum, stýrir sær sjálvari. Hevði dunnan ongan fígginda, var ikki livandi her fyri dunnum, so nógvar høvdu tær verið. Gæsnar missa ongan unga – fyrr enn á jólum. Eisini tann reguleringin virkar.

Sólin kemur upp millum Stong og Eystnes klokkan sirka hálvgum sjey og fer sníkjandi vestureftir at gera sniðálop á sortan. Hitin er pluss nøkur fá. Síðveturin er komin.

25. flagga vit fyri øllum hesum og okkara einasta stigi á sjálvstýrisleið. Sunnudagur er, tann 25., men tað er fyrigivið arbeiði at vinda í húnar hátt, marsjera og halda røður (bara røðan er skrivað gerandisdag).

Nú síðvetur er við øllum sínum halgidøgum og brotum á halgidagslógina, komi eg at hugsa um ein felagsskap í studentaskúlanum á Akureyri, har eg gekk fyri skjótt hálvari øld síðani. Latínlærarin og nakrir skúladreingir høvdu ein felagsskap, sum teir nevndu Saltatores, haldi eg tað var. Snobbaríið fyri latíni livdi framvegis tá í studentaskúlunum í Íslandi. Fantaseraðu, at tey gingu í latínskúla.

Felagsskapurin, ella klikan, Saltatores, helti seg til eina staðfesting hjá Cicero, á latíni sjálvandi:

»Nemo enim fere saltat sobrius, nisi forte insanit.«

Íslendska umsetingin var soleiðis:

»Einginn dansar ófullur, nema hann sé vitlaus.«

Tað merkir, leysliga týtt, at eingin dansar ódrukkin, uttan tey eru óð í høvdinum.

So tey, sum dansa edrú páskanátt, eru óð í høvdinum.